LM-099/2023

Fylgiskjal 22

VÁGA KOMMUNA

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
110 Tórshavn postsmogur

uvmr@uvmr.fo

Dagfesting: 21. februar 2024
Okkara j.nr.: 24/00050-5
Málsviðgeri: Jóhan Hendrik Ellefsen
Tygara j.nr.:

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um burðadygga ferðavinnu (ferðavinnulógin)

Til § 2

Sambært § 13 í uppskotinum skulu øll ferðafólk yvir 16 ár, sum koma til Føroya, gjalda eitt náttúrugjald. Tað átti tí at verði allýst hvat eitt "ferðafólk" er.

Til § 5

Hendan greinin er ógvuliga tengd at einari ókendari standardavtalu, sum landsstýrismaðurin skal gera. Tí er ringt at meta um hvørjar avleiðingarnar kunnu verða av hesi greinini.

Til § 6

Kommunurnar skulu gera eina ferðavinnuætlan saman við serstøku nevndini sbr. § 7, og í samráð við eigarar og brúkarar. Her er talan um eitt stórt arbeiði fyri kommununa sum skal gerast í samráð við nógvar ymiskar eigarar/brúkarar. Talan kann tí skjót verða um kommunur skulu seta fólk burturav at sita við hesum viðurskiftum. Vága kommuna hevur eina samstarvsavtalu við Sørvágs kommunu um Visit Vágar, sum skipar alt ferðavinnuvirksemi í Vágum og Mykinesi. Ferðavinnuætlanin skal røkka út á kommunumark. Her verður mælt til at umorða ásetingina soleiðis at kommunur eisini kunnu samstarva um at gera eina ferðavinnuætlan. Bygdagøtur ganga eisini yvir kommunumark, so tað er mest skynsamt um tað er ein samanhangur millum ferðavinnuætlanir hjá grannakommunum har bygdagøtur ganga yvir kommunumark.

Til § 8

Kommunan far við hesum ábyrgdina av at skipa ferðslu uttangarðs, tað er við at halda verandi bygdagøtur og við at merkja upp og gera nýggjar farleiðir. Vága kommuna hevur nøkur ferðavinnumál, sum verða nógv vitja ígjøgnum alt árið. Eingi av hesum liggja við bygdagøtur, og tí verður tað ein stór útreiðsla fyri kommununa um kommunan skal standa fyri at gera nýggjar gøtur í hesum økjum, sum eru at meta sum privat ogn í dag. Onkrastaðni hava lokalir eigarar sæð ein vinnuveg og stovna fyritøkur sum m.a. taka gjald fyri at ganga í haganum. Afturfyri hava eigararnir eisini sjálvir ábyrgdina fyri at ferðafólkini ganga eftir gøtum og at skipa viðurskifti við parkering og

Hammershaimbsvegur 1 // FO 360 Sandavágur
Tel +298 344 400 // vaga@vaga.fo

VÁGA KOMMUNA

o.ø. Hesar fyritøkur hava eina rímiliga góða inntøku og hava fólk í starvi. Alt hetta gevur í dag eisini kommununum eina inntøku við partafelagsskatti og persónskatti.

Við hesum uppskotinum verður grundarlagi fyri hesi vinnu tikið burtur og tað ávirkar kommununa fíggjarliga við mistum skattainntøkum. Harafturat verður ábyrgdin at skipa og gera hesar gøtur og halda tær viðlíka eisini løgd yvir á kommununa, sum aftur økir um rakstrarkostnaðin hjá kommununi. Tað er ógvuliga ivasamt um náttúrugjaldi sbrt. § 14 samsvarar við mistu inntøkurnar og øktu rakstrarútreiðslunum sum kommunurnar fáa við hesum uppskotinum.

Afturat hesum kemur eisini at friðingarmyndugleikar eisini skulu innyvir øll átøk sum verða gjørd uttangarðs, og tí kann væntast at trýstið á friðingarmyndugleikarnar økist og harvið kann væntast ein munandi longri viðgerðartíð enn í dag. Tí kann hetta eisini hugsast at gera umsitingina av hesum málum væl tyngri enn í dag.

Til §9

§ 9, stk 2 ásetir eina revsiheimild. Hon átti væl at ligið undir § 16.

Til § 13

Sum nevnt omanfyri til § 8, so hevur uppskotið stórar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Tí má gjaldið kommunurnar við hesum fáa samsvara við fíggjarligu ábyrgdina hetta uppskotið hevur fyri kommunurnar.

Til § 14

Her er aftur stór óvissa um, hvussu gjaldið verður býtt ímillum kommunur. Tað hevði verði áhugavert at fingið at vita hvussu nágreiniliga hvussu gjaldið verður býtt ímillum kommunurnar.

Vinaliga

Bjarni Prior
borgarstjóri

Hammershaimbsvegur 1 // FO 360 Sandavágur
Tel +298 344 400 // vaga@vaga.fo